Rørslutarnað sita inni um ólavsøkuna

Leiðarin á Serstovnadeildini, Bjarni Clementsen, heldur tænastuna á Hjálpartólamiðstøðin i vera út av lagi vánaliga. Úrslitið er, at fleiri rørslutarnað á Eirargarði gerast enn meira bundin enn neyðugt, tí koyristólarnir, ið ikki nøkta teirra serstaka tørv. Tí hevur hann óteljandi ferðir vent sær til stjóran á Almannastovuni at kæra sína neyð

RØRSLUTARNAÐ
Stefan í Skorini

Hjálpartólamiðstøðin í Havn megnar ikki at røkja sína uppgávu til fulnar. Avleiðingin av hesum er, at fleiri rørslutarnað á t.d. Eirargarði ikki fáa teirra koyristólar stillaðar og umvældar, sum teir skulu. Rørslutarnað mugu tískil nýta koyristólar, ið ikki nøkta teirra tørv til fulnar, og tey gerast enn meira innibundin enn frammanundan.

– Justeringar og umvælingar av hjálpartólum, vit hava fingið frá teimum, vera ikki gjørdar á nøktandi hátt av Hjálptartólamiðstøðini, sigur Bjarni Clementsen.

Talan er serliga um eldrivnar og framkomnar koyristólar, sum ikki eru gjørdir. Hetta hevur við sær, at tey brekaðu sita illa í stólunum, ella tey kunnu ikki nýta teir yvirhøvur.

– Vit hava vent okkum til Hjálpartólamiðstøðina óteljandi ferðir, og vit hava eisini kært okkara neyð til leiðsluna á Almannastovuni, sigur leiðarin av Serstovnadeildini.

– Uppgávurnar verða ikki gjørdar, so tað gongur út yvir okkara klientar, og tað kunnu vit ikki liva við.

Trupulleiki

At hetta er ein trupulleiki, hava vit fingið váttað á Eirargarði. Har hava nøkur rørslutarnað sitið í koyristólum, sum ikki hóska til tann einstaka brúkaran.

Á Eirargarði búgva fleiri rørslutarnað menniskju, ið hava ein serligan tørv. Tey eru tengd at einum koyristóli ella øðrum hjálpartóli allan dagin, um tey skulu flyta seg. Koyristólarnir mugu tí passa til tann einstaka, ið skal brúka hann. Um koyristólurin ikki verður umvældur ella innstillaður á rættan hátt, kann tann rørslutarnaði ikki nýta hann til fulnar.

Hetta er uppgávan hjá Hjálpartólamiðstøðini at syrgja fyri, at koyristólar og onnur hjálpartól altíð passa til tann tørv, ið brúkarin hevur. Til hetta arbeiði eru teknikarar og fysioterapeutar.

Eftir at Sosialurin fór at fregnast í hesum málinum, eru fólk av Hjálpartólamiðstøðini send út á Eirargarð at umvæla og stilla koyristólar. Tó er trupulleikin ikki loystur til fulnar enn. Onkur situr eftir uttan at hava fingið sín koyristól umvældan, tí viðkomandi persónur, ið skal taka sær av hesum málinum, er í summarfrí.

Talan er um nøkur ávís rørslutarnað á Eirargarði, sum líða undir hesum. Onkur hevur nú fingið sín koyristól gjørdan, men onkur má bíða í longri tíð enn.

Á Eirargarði verður sagt, at onkur av teimum multikoyristól gjørdan fyrr enn starvsfólk á Hjálpartólamiðstøðini eru komin aftur úr summarfrí. Inntil tá eru tey seingjarliggjandi, og kunnu tey ikki njóta tað frælsið, sum koyristólurin annars eigur at geva teimum.

Serkøn fólk vilja vera við, at um tørvurin skal nøktast til fulnar, so skulu tveir teknikarar setast bara til serstovnaøkið.

Sjúrða Gaard er spastikari. Hennara koyristólur skal stillast til hennara, men hetta verður ikki gjørt

Mynd: Álvur Haraldsen

Sjúrða er seingjarliggjandi

Sjúrða Gaard er ein teirra, ið hevur ein koyristól, ið als ikki nøktar hennara tørv. Sjúrða er ógvuliga ringur spastikari. Tí skal hon hava ein koyristól, ið er ógvuliga fínt innstillaður til hennara

RØRSLUTARNAÐ
Stefan í Skorini

Ein teirra, ið líður undir ikki at hava nóg góðan koyristól, er Sjúrða Gaard úr Eysturoynni. Hennara koyristólur er ógvuliga vánaligur, og tí kann Sjúrða bara sita upp nakrar fáar tímar um dagin.

Starvsfólkið á Eirargarði segði okkum, at Sjúrða onkuntíð bara situr uppi í koyristólinum í tveir tímar um dagin, tí koyristólurin er so vánaligur. Tað er gott fyri hana at sita nógv uppi hvønn dag, men hetta ber nú ikki til. Hon hevur brúk fyri einum serkønum at stilla sín koyristól, men viðkomandi er í summarfrí.

Tá hon fær krampa ella spenningar, so glíður hon niður í vinstru síðu, og høvdið hongur útav. Eisini fara beinini av lagi rættiliga skjótt.

– Tað kann ikki vera rætt, at Sjúrða skal liggja allan dagin, heldur mamma Sjúrðu. Hon sigur, at politikararnir skulu játta meira pening til hetta økið.

PRÝÐISLUTIR
VIÐ MOTIVUM ÚR NORRØNU GUDALÆRUNI
FRØYA
MIÐGARÐSORMURIN
Anker Eli Petersen hevur designað eina spennandi rað av prýðislutum við motivum úr norrønu gudalæruni. Her eru 2 motiv - fleri eru at velja ímillum.
Prýðislutirnir verða latnir í gávueskju við fittligum bøklingi um hvønn einstakan prýðislut.
Eitt frálíkt **gávuhugskot** - til studentin, føðingardagsbarnið, konfirmantin...
3arin
SMS · Tel 353535 · Fax 353536 · www.3-arin.com · 3-arin@3-arin.com

Arbeiðsbyrðan er ov stór

Leiðarin á Hjálpartólamiðstøðini, Palli Mortensen, heldur als ikki, at stovnurin kann lastast fyri at gera eitt vánaligt arbeiði. Hann vísir á, at stovnurin er veitari hjá øllum Føroyum, og at arbeiðsbyrðan er ov stór samanborið við peningaligu játtanina til starvsfólk

HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN
Stefan í Skorini

– Arbeiðsbyrðan hjá okkum er ov stór í mun til tað peningaliga tilfeingið, ið stovnurin hevur at ráða yvir, sigur Palli Mortensen, ið er leiðari á Hjálpartólamiðstøðini.

Hetta er óivað orsøkin til ónøgdina, ið hevur tikið seg upp á Serstovnadeildini um tænastuna frá Hjálpartólamiðstøðini.

Palli Mortensen sigur, at Hjálpartólamiðstøðin skal syrgja fyri hjálpartólum til allar Føroyar. Tænastuøkið fevnir sostatt um alt landið, og hetta er eitt stórt øki, tá hugt verður at tí arbeiðsorku, ið stovnurin hevur, greiðir Palli Mortensen frá.

– Tað kann altíð tosast um vit ikki kunnu gera okkurt betri, men tað er hinvegin torført at fara inn og gera broytingar, tá arbeiðsuppgávurnar eru so ómetaliga stórar frammanundan.

Fleiri málsviðgerðir

Í sambandi við ta stóru arbeiðsbyrðuna hjá stovninum, sigur Palli Mortensen, at talið av málsviðgerðum hjá stovninum er økt munandi seinastu árini.

– Seinastu tvey árini er málstilgongdin økt munandi, uttan at játtanin er økt samsvarandi. Vit klára ikki at loysa øll innkomin mál, og tí verður ein bíðirød, sigur Palli.

Orsøkin til hesa økingina er, at Hjálpartólamiðstøðin gerst kendari millum manna, og tí eru fleiri, ið vilja nýta hesa tænastuna. Eisini er heimarøktin farin at virka betur, og tað hevur við sær, at fleiri eldri fólk søkja um hjálpartól.

Eisini vísir Palli Mortensen á, at málini eru ógvuliga ymisk. Nøkur mál kunnu gerast í eini handavending, meðan onnur taka langa tíð.

At enda sigur leiðarin á Hjálpartólamiðstøðini, at stovnurin hevur eina bráfeingistænastu, um fólk hava tørv á bráfeingis hjálp.

Funnist hevur verið at Hjálpartólamiðstøðini fyri vantandi tænastu. Leiðarin vísir á, at arbeiðsbyrðan er ov stór, tá hugt verður at peningaligu játtanini og arbeiðsmegini á stovninum

Met í vitjanum

Framsýningin Hendur og Hugflog hevur verið árlig hending tey síðstu fimm árini. Hóast talið á framsýnarum er ymiskt, so er talið av teimum, ið vitja, vaksandi og setti í ár met

HANDVERK OG LIST
Dagfinn Olsen

Søluframsýningin Hendur og Hugflog, sum Føroya Heimavirkisfelag og Menningarstovan skipa fyri, er tiltak, har tey, ið virka ymiskt heima, fáa høvi at vísa fram fyri almenninginum.

Talið av framsýnarum hevur verið heilt uppi á 90. Framsýningin var í ár fyri fimtu ferð og 45 framsýnarar vístu fram alt frá træ- og silvurlutum, til pløgg, virkað úr føroyskum tilfari. Og mong vitjandi hava óivað ognað sær okkurt til føroyska búnan, nú tað stundar til ólavsøku.

Met

Hóast tað er ymiskt, hvussu nógv sýna fram, so er talið av teimum, ið vitja, vaksandi og setti í ár met.

Suni Poulsen á Menningarstovuni sigur, at 4.748 fólk vitjaðu Hendur og Hugflog í ár. Hetta er 250 fólk fleiri, enn fyri tveimum árum síðani, ið annars hevði met.

Hann metir, at góða veðrið var ein orsøk til metstóru vitjanina, umframt at langur leygardagur var í Havn og nógv folk tí vitja høvuðsstaðin. Mong hava eisini summarfrí. Eisini er løtan, ið Hendur og hugflog er, góð fyri tey vitjandi, um enn minni góð fyri framsýnararnar, ið stákast til ólavsøku og kanska er heldur tvørt at sita og virka ymiskt í besta summarveðri og royna at gerast liðugur til sýningina.

Tað hevur verið upp á tal at flyta framsýningina, men løtan er so mikið góð fyri tey vitjandi, at henda ætlan er slept.

Suni Poulsen sigur annars, at talið á framsýnarum alla tíðina hevur verið óstøðugt. Vanliga eru eini tveir gestaframsýnarar úr útlondum við og so var eisini í ár.

Bakka út

Menningarstovan hevur avgjørt at taka seg aftur sum fyriskipari av Hendur og Hugflog.

- Vit sleppa tí tó ikki heilt, men ynskja at bakka út. Men tó ikki so skjótt, at tiltakið dettur niðurfyri. Men vit meta, at tíðin er komin, at vit bakka út. Vit eru ein lítil stovnur og kunnu ikki væl hanga í tí sama ov longi, sigur Suni Poulsen, sum metir, at tiltakið hevur eina framtíð og ikki dettur niðurfyri, nú Menningarstovan spakuliga tekur seg aftur sum fyrireikari.

Vandamikið horn

Yvirskriftin fær kanska onkran at hugsa um gøtuhornið á myndini og ferðslu. Men tað er als ikki hetta, ið sipað verður til

PIPAR
Dagfinn Olsen

Ungir sveinar eru eitt útsett fólkaslag. Og gerast teir so piparsveinar, so eru ikki mørk fyri tí vanda, hesir koma í.

At fara um tey 30 árini er ikki sum at siga tað. Tað er av sonnum eitt vandamikið horn at fara um.

Hevur sveinurin so ikki funnið ta røttu, ta einastu einu, men gongur fríur sum fuglurin, so eru vinfólkini skjót at heiðra piparsveinin. Hvørt talan so er um væl meint skemt við skálkinum aftanfyri oyrað, ella tað til tíðir verður gjørt vegna svartsjúku, skal her ikki støða takast til.

Ein sannroynd er tað tó, at royndirnar, ið piparsveinar verða útsettir fyri, eru harðar og almenna ústtillingin kennir eingi mørk.

Piparbússurnar, ið vanligt er at seta upp uttanfyri, har piparsveinurin býr, gerast alsamt størri og kreativiteturin blómar. Óneyðugt er at siga, at har piparsveinurin býr, ofta er heima hjá mammu og pápa, sum so eiga stríðið at fáa ovurhonds stóru piparbússuna førda burtur – ofta við lastbili.

Myndamaðurin kom í gjár framvið hesi stóru, ljósareyðu piparbússuni á Hoyvíksvegnum í Havn. Har stendur hon og fyri líkasum at staðfesta vandamikla hornið, ið ungi sveinurin er farin um, er hon sett upp á hornínum Hoyvíksvegur og Mýrusnýpuvegur.

Søgur siga, at gamlir dreingir, piparsveinar, ofta eru múgvandi. Kanska er eitt hugskot, at bússan verður nýtt til sparibússu, ístaðin fyri at peningur verður nýttur til at fáa hana burturbeinda. Ein sannroynd er tað, at ungi maðurin, ið farin er um vandamikla hornið, má í hornatøk við stóru bússuna, líkamikið hvat gerast skal við hana. Á gøtuhorninum kann hon so ikki standa.

Hotel Føroyar um Ólavsøkuna
Stóra kalda borðið 250,-
Barn 7-12 ár kr. 75,-
Opið er soleiðis:
Ólavsvakuaftan 29/7 kl. 16.00-22.30
Ólavsvakudag 29/7 kl. 14.00-22.30
Matstovan "Atlantis" bjóðar
Friggjadagin 27/7. Ólavsvakuaftan 29/7. Ólavsvakudag 29/7. Mánadagin 30/7
A LA CARTE
Forrettir: kr. 49,-
Fiskaskúvur á eplum, dipsi og heimabakaðum brøyði
Asparagessuppa við asparagus og heimabakaðum brøyði
Høvuðsrettir: kr. 145,-
Stiff Bernaise á steik, bakaðum epli og Bernaisesós
Royksteikur bøkur á smurðum grønmeti, kryddsmør og bakaðum epli
Lambastaik á reyðvín, brúnum epsum og sós av soðnum
Oksasteik á grønmeti, epsum og sós av soðnum
Steikur laksur við spinatsmeti, grønmeti og ris
Onnurt: kr. 49,-
Ískaksurt á la Hotel Føroyar
Sjokoladikaksur
3 rættir kr. 195,-
Opið er soleiðis:
Friggjadagin 27/7 kl. 12.00-22.30
Ólavsvakuaftan 29/7 kl. 12.00-16.00
Ólavsvakudag 29/7 kl. 12.00-14.00
Mánadagin 30/7 kl. 12.00-22.30
-Her kalt borð eisini er í matstovuni
Hotel Føroyar gushin ellum sínum góða ólavsøku
Hotel Føroyar
Tlf. 217500